Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	08-01-2023
Mál nr.:	23/21201
Málsviðgjørt:	MM
Ummælistíð:	Frá 10. januar til 31. januar
Eftirkannað:	07-02-2024

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin)
(Fráboðan um børn við bústaði í Danmark, stuðul til foreldramyndugleikan, heimild til barnaverndarnevndina at taka avgerð um ávís viðurskifti hjá barninum og heimild at flyta barnaverndarmál millum barnaverndartænastur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við § 3 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 14 verður sum stk. 7 sett:
"*Stk. 7.* Fáa persónar í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi innan barnaøkið og ungdómsøkið fyri tað almenna, kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn undir 18 ár, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu tey boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum. Ásetingin fevnir eisini um ófødda barnið, sum vegna viðurskifti hjá foreldrunum, kann fáa tørv á serligum stuðli eftir føðing."

2. Í § 19 verður sum stk. 5 sett:
"*Stk. 5.* Barnaverndarnevndin kann, við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman."

3. Í § 21 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Tá tað verður mett neyðugt í mun til endamálið við heimansetanini, skal barnaverndarnevndin, grundað á eina leypandi uppfylgjan og eftirlit við barninum sambært § 16, taka avgerð um viðgerð og útbúgving o.a., ímeðan barnið er sett heiman."

4. Í § 42, stk. 2, nr. 4 verður "á fundinum, og" broytt til: "á fundinum."

5. § 42, stk. 2, nr. 5 verður strikað.

6. Í § 58 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4.* Í heilt serligum førum kann avtala gerast ímillum barnaverndarnevndir um, at eitt barnaverndarmál verður flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Avvarðandi barnaverndarnevnd avger, um eitt barnaverndarmál kann verða flutt til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita eftir umbøn frá foreldramyndugleikanum."

7. Í § 65, stk. 1 verður "um avgerðina." broytt til: "um avgerðina, sbrt. tó stk. 3."

8. Í § 65 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Avgerðir um at flyta eitt barnaverndarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita sbrt. § 58, stk. 4, kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Hetta lógaruppskotið er grundað á ymiskar trupulleikar, sum hava stungið seg upp ígjøgnum tíðina, og sum gera tað ynskiligt at broyta lógina. Eisini hava myndugleikar og stovnar innan barnaverndarøkið gjørt vart við ávís viðurskifti í lógini, sum antin mangla ella ikki virka eftir ætlan.

Endamálið við broytingunum er sostatt sum heild at tillaga lógina og gera rættingar, sum bøta um lógina.

Hugtakið "barn" verður í hesum lógaruppskoti brúkt bæði í mun til børn og ung.

1.2. Galdandi lóggáva og uppskot til broytingar

Barnaverndarlógin ásetur í § 3, at lógin er galdandi fyri børn, ið eru stødd í Føroyum. Fráboðanarskyldan í kapittul 3 er tí einans galdandi fyri børn og ung, sum eru stødd í Føroyum. Harumframt heimilar fráboðanarskyldan í § 62 barnaverndarnevndini at kunna rætta myndugleika uttanlands, um ein familja við børnum undir 18 ár, ið býr í Føroyum, flytur uttanlands.

Fakfólk í almennum størvum og persónar, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, kunnu sum nú er ikki boða viðkomandi myndugleikum í Danmark frá, um tey fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi. Samstundis kunnu ásetingarnar í dátuverndarlógini um at geva víðari persónsupplýsingar elva til óvissu hjá einstaka fakfólkinum um, hvørt tey kunnu geva víðari upplýsingar um persónlig viðurskifti um eitt barn til ein myndugleika í Danmark uttan greiða heimild í lóg.

Heimild at boða einum donskum myndugleika frá verður tískil sett inn í § 14, stk. 7, sum hevur við sær, at fakfólk í almennum størvum, og fakfólk, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, kunnu boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá, um tey í sambandi við starv sítt fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, ella um eitt barn beint eftir føðing fer at fáa tørv á serligum stuðli vegna viðurskifti hjá foreldrunum. Talan er ikki um eina fráboðanarskyldu, men um ein møguleika at boða frá ávísum viðurskiftum um eitt barn til ein danskan myndugleika.

Endamálið við ásetingini er at tryggja, at viðkomandi myndugleikar í Danmark verða varugir við og fáa kunnleika til børn og ung, sum mistrívast, soleiðis at røttu myndugleikar kunnu meta um, um tørvur er á at seta í verk fyriskipanir fyri eitt ávíst barn.

Við hesum lógaruppskoti verður í § 19, stk. 5 sett inn heimild at seta í verk fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Talan er einans um eina nágreining av galdandi siðvenju og viðmerkingum til galdandi ásetingar. Grundað á viðmerkingar til barnaverndarlógina er longu greið heimild til at seta fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Tørvur er tó á einari nágreining av viðmerkingunum til barnaverndarlógina í § 19, stk. 5, sum ásetur, at barnaverndarnevndin kann veita hjálp og stuðul til foreldramyndugleikan eftir tørvi, ímeðan

barnið er sett heiman, óansæð um barnið er sett heiman við ella uttan samtykki frá foreldramyndugleikanum.
Stuðulin kann t.d. fevna um sálarfrøðiligar viðtalur, familjuviðgerð, skeið í foreldraførleika ella líknandi. Stuðulin skal hjálpa foreldrunum at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman. Tó kann einhvør tørvur ikki hava við sær stuðul sambært hesi grein. Tað er altíð ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum máli, um fyriskipan er neyðug, og hvør fyriskipan skal setast í verk fyri at loysa trupulleikarnar hjá foreldrunum.

Endamálið við ásetingini er, at stuðulin skal viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum eru orsøk til umsorganaryvirtøkuna, og á henda hátt hjálpa foreldrunum at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman.

Í § 21, stk. 3 verður nýggj áseting sett inn við tí endamáli at tryggja, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum er neyðug í mun til endamálið við heimansetanini, og sum er til barnsins besta.

Tað kann hava stóran týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at barnaverndarnevndin hevur atgongd til at taka neyðugar avgerðir um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum.

Í ávísum førum ynskir foreldramyndugleikin ikki at samstarva við barnaverndartænastuna, ella foreldramyndugleikin er ímóti ella ikki samdur við barnaverndartænastuni um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum. Støðan kann eisini verða tann, at foreldramyndugleikin ikki er førur fyri at taka eina væl grundaða avgerð um ítøkiligu støðuna hjá barninum vegna sálarligar avbjóðingar, menningartarn, misbrúk o.s.fr. Harumframt kann hugsast, at foreldramyndugleikin í ávísum førum ikki er tætt knýttur at barninum av ymiskum orsøkum, ella ikki hevur gott innlit í lívið ella gerandisdagin hjá barninum, og tí ikki kann gera eina væl grundaða meting av ítøkiligu støðuni hjá barninum. Eftir galdandi lóggávu er ikki heimild hjá barnaverndarnevndini at taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum, um foreldramyndugleikin er ímóti avgerðini og ikki vil geva samtykki, heldur ikki sjálvt um barnið ynskir avgerðina. Tí er tað týdningarmikið, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti í lívinum hjá barninum, sum er til barnsins besta.

Ásetingin kann verða nýtt í sambandi við mál, ið snúgva seg um ávís persónlig viðurskifti viðvíkjandi barninum ella tí unga, sum hava ovurstóran týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan, og sum foreldramyndugleikin er ósamdur við barnaverndartænastuni um. Í hesum førum skal barnaverndarnevndin taka eina fyrisitingarliga avgerð, ið kann kærast til Føroya Kærustovn. Vísast skal til nærri lýsingina av ásetingini í serligu viðmerkingunum.

§ 42, stk. 2, nr. 5 í barnaverndarlógini verður strikað grundað á, at ásetingin verður mett óneyðug í sambandi við at skriva eina gerðabók um fundirnar hjá barnaverndarnevndini.

Í § 58, stk. 4 verður nýggj áseting sett inn, sum ger tað møguligt at flyta eitt barnaverdarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita.

Sambært barnaverndarlógini verður barnaverndarøkið umsitið av staðbundnum kommunalum barnaverndartænastum. Barnaverndarmál verða umsitin alt eftir, hvar tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, búgva. Heimild er ikki í galdandi barnaverndarlóg hjá nøkrum

myndugleika at taka avgerð um at flyta eitt barnaverndarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita.
Eitt barnaverndarmál verður tó sjálvvirkandi flutt, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, flyta bústað til eitt annað barnaverndarøki, sbrt. § 58 í barnaverndarlógini.

Í heilt serligum førum kann tørvur verða á at flyta eitt barnaverdarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Hetta kann t.d. verða vegna eina sera fastlæsta støðu hjá ávísum foreldrum í einum ítøkiligum barnaverndarmáli. Tørvur kann í hesum førum verða á, at ein onnur barnaverndarnevnd yvirtekur málið til at viðgera og meta um. Í summum førum kann hetta gera mun fyri samstarvið og samskiftið við barnaverndartænastuna um málið, og verða til gagns fyri bæði barnið og familjuna. Hetta verður tó einans møguligt í heilt serligum førum, tá ið barnaverndarnevndin metir, at hetta er alneyðugt fyri samstarvið og samskiftið í málinum, og fyri barnið og foreldrini.

Endamálið við nýggju ásetingini í § 58, stk. 4 er at hjálpa einum barni og familju í heilt serligum førum, tá ið málið og støðan tykist so fastlæst og vónleys, eins og samskiftið og samstarvið ímillum foreldur og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu.

Í § 65, stk. 3 verður nýggj áseting sett inn um at avgerðir sambært § 58, stk. 4 - um at flyta eitt barnaverndarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita - ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Hetta er grundað á, at tað er avvarðandi barnavernarnevnd, sum kennir málið best, og hevur nágreiniligt innlit í allar síður og støður í málinum, herundir allar fyriskipanir, ið eru settar í verk og øll viðurskifti hjá barninum, foreldrunum og familjuni annars. Avvarðandi barnaverndartænasta er tí uttan iva best skikkað til at meta um, um tað er neyðugt og ráðiligt fyri barnið og familjuna at flyta málið til eina aðra barnavernarnevnd at umsita. Mett verður ikki, at aðrir fyrisitingarligir myndugleikar kunnu gera somu meting við fyriliti til øll sjónarmið í málinum, av tí at teir ikki hava sama nágreina innlit í málið, á sama hátt sum avvarðandi barnaverndarnevndin hevur, og kunnu tískil ikki gera eina grundaða meting av, hvat er best fyri barnið, foreldrini og aðrar partar í málum.

1.3. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Barnaverndarstovu Føroya, Barnaverndartænastunum, Kærustovni Føroya, Almannaverkinum, Fosturforeldrafelagnum, Føroya Kommunufelag, Løgmálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum, Løgtingsins Umboðsmanni (BUM), Familjufyrisitingini, Sosialráðgevarafelag Føroya, Føroya Pedagogfelag, Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Lærarafelag, Ljósmøðrafelag Føroya, Føroyskir Sálarfrøðingar, Heilsurøktarafelagnum, Dátueftirlitinum, MEGD, Føroya Landfúta, Barnabata og MEA.

Ummæli er komið frá Føroya Kærustovni, Familjufyrisitingini, Sosialráðgevarafelag Føroya, MEGD, Tórshavnar barnaverndartænastu, Barnaverndarstovu Føroya, Føroya Politi, Dátueftirlitinum, Almanna- og mentamálaráðnum, Heilsurøktarafelagnum, Sernámi og Familjuhjálpini.

Føroya Politi, Dátueftirlitið, Almanna- og mentamálaráðið og Heilsurøktarafelagið hava boðað frá, at tey ongar viðmerkingar hava til uppskotið.

Føroya Kærustovnur hevur viðmerkt, at tað ikki framgongur greitt av viðmerkingunum til ætlaðu broytingina í § 15, stk. 2, um fyriskipanin kann setast í verk, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta seg ímóti avgerðini.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at grundað á hoyringarsvar og viðmerkingar frá Lógartænastuni um, at ásetingin møguliga ikki er neyðug, er ásetingin tikin úr broytingaruppskotinum.

Føroya Kærustovnur metir tað vera ivasamt, um nýggja heimildin í § 19, stk. 5 eisini sipar til hjálp/stuðul undir samveruni millum barn og foreldur, sum Kærustovnurin hevur heimild at áseta sambært § 22, stk. 4, nr. 2.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at í viðmerkingunum til ásetingina er nú sett inn, at ásetingin ikki kann verða nýtt í mun til at seta inn eftirlit ella stuðul í sambandi við samveru sambært § 22, stk. 4. Hetta tekur Føroya Kærustovnur avgerð um, eftir tilmæli frá barnaverndartænastuni.

Føroya Kærustovnur hevur viðmerkt, at tað ikki er heilt greitt í viðmerkingunum til ásetingina í § 21, stk. 3, nær talan er um eina fyrisitingarliga avgerð, og nær talan er um veruligt fyrisitingarvirksemi.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at grundað á samrøðu við Føroya Kærustovn er greiða komin á, hvat viðmerkingarnar til ásetingina nærri rúma, og uppskotið er tillagað samsvarandi samrøðuni við Føroya Kærustovn í mun til tað, partarnir vórðu samdir um.

Familjufyrisitingin skjýtur upp, at greið heimild verður sett inn í barnaverndarlógina um at barnaverndartænastan skal viðvirka til at finna skikkaðan foreldramyndugleika, tá ið barnið ikki hevur ein foreldramyndugleika.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at hetta verður umrøtt í sambandi við næstu broytingina av barnaverndarlógini.

Familjufyrisitingin skjýtur upp, at greiða fæst á, hvussu hugtøkini ”foreldur” og ”foreldramyndugleikahavi” skal skiljast, tá ið talan er um yrkisforeldramyndugleikahava.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at hetta ikki er viðkomandi fyri sjálva lógarbroytingina, men at hetta skal kannast nærri í mun til galdandi lóggávu.

Sosialráðgevarafelag Føroya, Tórshavnar barnaverndartænasta og Barnaverndarstovan hava sett spurningin, hví bert børn, ið búgva í Danmark og ikki øðrum londum, eru fevnd av § 14, stk. 7.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at orsøkin til, at ásetingin í § 14, stk. 7 bert fevnir um børn, sum hava bústað í Danmark (bæði donsk børn og føroysk børn, sum búgva í DK), er, at avtala er gjørd við danskar myndugleikar (Socialministeriet) um, at tað skal verða møguligt at yvirføra persónsupplýsingar viðvíkjandi hesum børnunum ímillum FO og DK. Við hesari ásetingini verður greið heimild sett inn í mun til hesi børnini. Sama avtala er ikki gjørd við onnur lond. Ásetingin er viðkomandi í mun til lond, har ið sannlíkt er, at børn, ið búgva í tí landinum, koma til Føroya. Ásetingin er minni viðkomandi í mun til lond, har tað ikki er serliga sannlíkt, at eitt barn, ið býr har, kemur til Føroya.

Sosialráðgevarafelag Føroya, Tórshavnar barnaverndartænasta, Sernám og Barnaverndarstova Føroya hava viðmerkt, at í viðmerkingunum til § 15, stk. 1, nr. 12

vantar frágreiðing um, hvørja hjálp hugsað verður um, sum ikki longu er fevnd av § 15, stk. 1, nr. 1-11. Ein nærri nágreining vantar.

Eisini verður gjørt vart við, at § 15, stk. 1 í stóran mun longu loyvir barnaverndartænastum at veita aðra hjálp til barnið og familjuna. Harumframt er spurningur settur um, um ásetingin fevnir um fíggjarliga hjálp og ókeypis
advokathjálp.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at grundað á hesi hoyringarsvar og viðmerkingar frá Lógartænastuni um, at ásetingin møguliga ikki er neyðug, er ásetingin tikin úr broytingaruppskotinum.

Sosialráðgevarafelag Føroya og Tórshavnar barnaverndartænasta hava viðmerkt, at § 19, stk. 5 bert viðvíkur foreldramyndugleikanum, og at tað kann verða viðkomandi, at ásetingin eisini fevnir um onnur, t.d. systkin, makar og onnur, ið standa foreldramyndugleikanum nær.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at avmarkingin av ásetingini er tilvitað. Orsøkin til avmarkingina er, at bert foreldramyndugleikin hevur løgfrøðiliga ábyrgd í mun til barnið. Ein møguligur samlivi ella onnur hava onga skyldu/rættindi í hesum sambandi. Harafturat er trupult at avmarka hugtakið samlivi, og nær talan er um ein samliva, herundir í mun til, hvussu long tíð skal vera fráliðin, áðrenn talan er um ein samliva. Harafturat krevur hetta fígging, ið galdandi lóggáva ikki heimilar.

Sernám hevur viðmerkt, at í mun til § 19, stk. 5 er tað ikki gagnligt, at foreldur uttan víðari bara kunnu takka nei til tilboðið.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at mett verður, at fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 einans skulu kunna setast í verk við samtykki frá foreldramyndugleikanum. Orsøkin til hetta er, at tað ikki kemur nakað burturúr at seta fyriskipanir í verk fyri foreldrini ímóti teirra vilja. Hetta má vera teirra egna val.

Familjuhjálpin hevur viðmerkt, at eftir galdandi lóggávu § 15, stk. 1, nr. 1-11 hevur barnaverndarnevndin heimild til at seta allar neyðugar fyriskipanir í verk.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at grundað á hoyringarsvar og viðmerkingar frá Lógartænastuni um at ásetingin møguliga ikki er neyðug, er ásetingin tikin úr broytingaruppskotinum.

Sosialráðgevarafelag Føroya og Tórshavnar barnaverndartænasta hava viðmerkt, at orðingin í § 21, stk. 3 er ógreið, og at tørvur er á einari neyvari lýsing av, nær avgerð skal takast eftir hesi ásetingini.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at vísast skal til serligu viðmerkingarnar til ásetingina í mun til eina neyvari lýsing av greinini. Harumframt skal viðmerkjast, at viðmerkingarnar eru nágreinaðar í mun til, nær ásetingin kann verða nýtt.

Sosialráðgevarafelag Føroya hevur viðmerkt, at ynskiligt er at fáa upplýst, hvørjar treytir skulu leggjast til grund fyri einari avgerð sambært § 58, stk. 4.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at avvarðandi barnaverndarnevnd metir um, um tað er neyðugt og ráðiligt at flyta eitt barnaverndarmál til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Hetta verður einans møguligt í heilt serligum førum, har ið barnaverndarnevndin metir, at hetta er alneyðug fyri samstarvið og samskiftið í málinum, og fyri barnið og foreldrini. Heilt serligar umstøður eru t.d. tá eitt barnaverndarmál hevur koyrt í fleiri ár hjá somu barnaverndartænastu, har ið samskiftið og samstarvið millum foreldur og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu. Barnaverndarnevndin tekur støðu til

henda spurningin eftir umbøn frá foreldramyndugleikanum. Metir avvarðandi barnaverndarnevnd ikki, at tað av ymiskum orsøkum (t.d. atlit til barnið) er neyðugt og ráðiligt at flyta eitt mál til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita, er henda metingin endalig, og kann ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika at taka støðu til. Grundin til hetta er, at avvarðandi barnaverndarnevnd kennir málið best, og hevur nágreiniligt innlit í allar síður og støður í málinum, fyriskipanir og viðurskifti hjá barninum og familjuni. Avvarðandi barnaverndartænasta er tí best skikkað til at meta um, um tað er neyðugt og ráðiligt fyri barnið og familjuna at flyta málið til eina aðra barnavernarnevnd at umsita.

MEGD hevur sett spurningin, hví fráboðanarmøguleikin í § 14, stk. 7 ikki heldur er ein skylda. Harumframt hevur MEGD sett spurningin, um fráboðarin kann verða ónavngivin, og um § 14, stk. 4-6 er galdandi fyri hesar fráboðanir. Harafturat eftirspyr MEGD fleiri upplýsingar um, hvat dátuverndarlógin sigur um at lata upplýsingar til danskar myndugleikar.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at ráðið hevur mett, at talan skal vera um ein møguleika, og ikki eina skyldu grundað á, at tað ikki er møguligt at hava eftirlit við, um fakfólk fráboða ella ikki. Harumframt er ætlanin við ásetingini ikki, at fakfólk skulu føla seg bundin av ásetingini, ella at tey fáa álagt eina uppgávu afturat at loysa. Harumframt er ætlanin, at fráboðarin kann velja, um hann ynskir at vera navngivin ella ónavngivin. Summi fakfólk hava einki ímóti, at navn teirra verður upplýst í hesum sambandi, meðan onnur fakfólk halda seg aftur frá at fráboða, um navn teirra verður upplýst. Eisini kann upplýsast, at § 14, stk. 4-6 er ikki galdandi í mun til eina fráboðan til ein danskan myndugleika. At enda stendur í viðmerkingunum til ásetinginina, at *sambært § 59 í dátuverndarlógini krevur flutningur av persónsupplýsingum til útlond ikki serliga góðkenning ella loyvi frammanundan. Flutningurin av persónsupplýsingum skal tó vera í samsvari við dátuverndarlógina, og verður framdur eftir einari ítøkiligari meting í hvørjum einstøkum máli.* Endamálið er ikki at lýsa til fulnar, hvussu málið annars skal viðgerast í mun til dátuverndarlógina ella aðrar viðkomandi lógir. Endamálið er bert at upplýsa, at flutningurin av persónsupplýsingum altíð skal vera í samsvari við dátuverndarlógina. At enda skal viðmerkjast, at viðmerkingarnar eru lagaðar til, um fráboðarin skal vera navngivin ella kann vera ónavngivin.

MEGD hevur sett spurningin, um nýggja ásetingin í § 19, stk. 5 einans fevnir um fyriskipanir sambært § 15, stk. 1.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið kann upplýsa, at ásetingin fevnir um fyriskipanir sambært § 15, stk. 1. Hetta er nú nágreinað í ásetingini, hóast hetta tykist greitt í viðmerkingunum.

MEGD hevur viðmerkt, at farast skal fram við hóvsemi í mun til avgerðir eftir ásetingini í § 21, stk. 3.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at mett verður, at ásetingin er neyðug í mun til at tryggja, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum er til barnsins besta. Hetta eru mál, ið snúgva seg um viðurskifti, sum hava ovurstóran og víðfevndan týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan, og sum foreldramyndugleikin er ósamdur við barnaverndartænastuni í. Tað kann hava stóran týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at atgongd er hjá barnaverndarnevndini til at taka neyðugar avgerðir um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum. Viðmerkjast skal, at viðmerkingarnar eru nágreinaðar grundað á hoyringina.

Barnaverndarstovan hevur viðmerkt, at mælt verður til, at ‘‘*í heilt serligum fórum’’* verður strikað í orðingini av § 58, stk. 4, av tí at barnaverndartænasturnar sjálvar eru førar fyri at meta um, nær tørvur er á at flyta eitt barnaverndarmál til eina aðra barnaverndartænastu at umsita.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at mett verður, at orðingin ‘‘*í heilt serligum fórum’’* er neyðug. Hetta er grundað á, at ætlanin við ásetingini er bert at gera tað møguligt í heilt serligum fórum at flyta eitt barnaverndarmál til eina aðra barnaverndartænastu at umsita. Ætlanin er ikki, at mál kunnu verða flutt uttan grund og uttan serligar umstøður gera tað neyðugt. Hetta er eisini fyri at avmarka, at ásetingin verður nýtt uttan umhugsni, og at mál verða flutt millum barnaverndartænastur uttan serliga grund.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Hóast uppskotið hevur við sær ávísar minni umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur, sí niðanfyri undir pkt. 2.2., so verður ikki mett, at broytingin fer at ávirka arbeiðsorkuna hjá nøkrum myndugleika, og eigur tískil ikki at hava stórvegis fíggjarligan týdning fyri land og kommunur.

Broytingin í § 19, stk. 5 um at seta í verk fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 fyri foreldramyndugleikan, verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Hetta er grundað á, at talan einans er um eina nágreining av galdandi siðvenju og viðmerkingum til galdandi ásetingar. Sambært viðmerkingunum til barnaverndarlógina er longu heimild til at seta fyriskipanir í § 15, stk. 1 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Tørvur er tó á einari nágreining av viðmerkingunum.

Tað er altíð ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum máli, um fyriskipan er neyðug, og hvør fyriskipan skal setast í verk fyri at loysa trupulleikarnar hjá foreldrunum. Einhvør tørvur kann sostatt ikki hava við sær stuðul sambært hesi grein.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri landið og kommunur við tað, at persónar í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi innan barna- og ungdómsøkið fyri tað almenna, fáa møguleika at boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá, um tey fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn undir 18 ár, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi.

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommununrnar við tað, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð um at seta í verk fyriskipan sambært § 15, stk. 1 fyri foreldramyndugleikan. Sí um fíggjarligar avleiðingar av hesari broytingini í punkt 2.1.

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommununrnar við tað, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, ímeðan barnið er sett heiman, um tað verður mett neyðugt fyri endamálið við heimansetanini. Sí um fíggjarligar avleiðingar av hesari broytingini í punkt 2.1.

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar við tað, at avtala kann gerast ímillum barnaverndarnevndir í heilt serligum førum um, at eitt barnaverndarmál verður flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Sí um fíggjarligar avleiðingar av hesari broytingini í punkt 2.1.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur við sær positivar sosialar avleiðingar fyri foreldur at umsorganaryvirtiknum børnum, ið kunnu fáa hjálp og stuðul sambært § 15, stk. 1, ímeðan barnið er sett heiman.

Uppskotið hevur við sær positivar avleiðingar fyri foreldur við tað, at eitt barnaverndarmál kann verða flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Á henda hátt ber til at hjálpa einum barni og familju í heilt serligum førum, har ið málið og støðan tykist so fastlæst og vónleys, eins og samskiftið og samstarvið ímillum foreldur og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki ávirkan á tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

Lógaruppskotið ger inntriv í rættin hjá foreldramyndugleikanum at einum umsorganaryirtiknum barni, í mun til at barnaverndarnevndin fær heimild at taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, sum áður hevur ligið hjá foreldramyndugleikanum at avgera.

Hetta er grundað á, at tað kann hava stóran týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at atgongd er hjá barnaverndarnevndini til at taka neyðugar avgerðir um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, sum er til barnsins besta.

Í ávísum førum ynskir foreldramyndugleikin ikki at samstarva við barnaverndartænastuna. Foreldramyndugleikin kann eisini vera ímóti ella ikki samdur við barnaverndartænastuni um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum. Støðan kann eisini verða tann, at foreldramyndugleikin ikki er førur fyri at taka eina væl grundaða avgerð um ítøkiligu støðuna

hjá barninum vegna sálarligar avbjóðingar, menningartarn, misbrúk o.s.fr. Harumframt kann hugsast, at foreldramyndugleikin í ávísum førum ikki er tætt knýttur at barninum av ymiskum orsøkum, ella ikki hevur gott innlit í lívið ella gerandisdagin hjá barninum, og tí ikki kann gera eina væl grundaða meting av ítøkiligu støðuni hjá barninum. Tí er tað týdningarmikið, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti í lívinum hjá barninum, sum er til barnsins besta. Eftir galdandi lóggávu er ikki heimild hjá barnaverndarnevndini at taka avgerð um sera persónlig viðurskifti hjá barninum, um foreldramyndugleikin er ímóti avgerðini og ikki vil geva samtykki, heldur ikki sjálvt um barnið ynskir avgerðina.

Endamálið við ásetingini í § 21, stk. 3 er at tryggja, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum er neyðug í mun til endamálið við heimansetanini, og sum er til barnsins besta.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ongar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur heimildir til persónar, sum í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi innan barna- og ungdómsøkið fyri tað almenna, fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn undir 18 ár, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum.

Lógaruppskotið leggur heimildir til kommunurnar við tað, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð um at seta fyriskipan sambært § 15, stk. 1 í verk fyri foreldramyndugleikan, eins og barnaverndarnevndin kann taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, ímeðan barnið er sett heiman, um tað verður mett neyðugt fyri endamálið við heimansetanini. Eisini leggur lógaruppskotið heimildir til barnaverndarnevndirnar í mun til at avtala kann gerast ímillum barnaverndarnevndir í heilt serligum førum um, at eitt barnaverndarmál verður flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1, nr. 1
Barnaverndarlógin ásetur í § 3, at lógin er galdandi fyri børn, ið eru stødd í Føroyum. Fráboðanarskyldan í kapittul 3 er tí einans galdandi fyri børn og ung, sum eru stødd í Føroyum. Harumframt heimilar fráboðanarskyldan í § 62 barnaverndarnevndini at kunna rætta myndugleika uttanlands, um ein familja við børnum undir 18 ár, ið býr í Føroyum, flytur uttanlands.

Fáa fakfólk í Føroyum í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu tey sum nú er ikki boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum. Samstundis kunnu ásetingar um at geva víðari persónsupplýsingar í dátuverndarlógini elva til óvissu hjá einstaka fakfólkinum um, um tey kunnu geva víðari upplýsingar um persónlig viðurskifti viðvíkjandi einum barni til ein danskan myndugleika uttan greiða lógarheimild.

Tískil verður nýggj áseting sett inn í § 14, stk. 7, har ið persónar, sum í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum. Ásetingin fevnir eisini um ófødda barnið, sum vegna viðurskifti hjá foreldrunum, kann fáa tørv á serligum stuðli eftir føðing.

Ásetingin hevur við sær, at fakfólk í almennum størvum, og fakfólk, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, kunnu boða viðkomandi myndugleika (kommunalbestyrelse) í Danmark frá, um tey í sambandi við starv sítt fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, ella um eitt barn beint eftir føðing fer at fáa tørv á serligum stuðli vegna viðurskifti hjá foreldrunum. Talan er ikki um eina fráboðanarskyldu, men um ein møguleika hjá fakfólkum at boða frá ávísum viðurskiftum viðvíkjandi einum barni, sum býr í Danmark, til ein danskan myndugleika.

Hetta merkir, at alment sett starvsfólk sum t.d. fakfólk hjá skúlatannlæknanum, námsfrøðingar og lærarar í fólkaskúlanum, frítíðarskúlum, eftirskúlum, fakfólk í kommunalum dag- og frítíðartilboðum ella almennum tilhaldsstøðum, kreppumiðstøðum og viðgerðartilboðum, kunnu boða einum donskum myndugleika (kommunalbestyrelse) frá, um eitt barn undir 18 ár, sum býr í Danmark, kann hava tørv á, at ávís fyriskipan verður sett í verk.

Eisini eru persónar, sum útinna virksemi innan barna- og ungdómsøkið fyri tað almenna, herundir t.d. læknar, sum ikki eru alment settir og persónar, sum t.d. arbeiða í ymiskum dag- og frítíðartilboðum, starvsfólk á fríum fólkaskúlum og persónar, sum starvast á tilhaldsstøðum, kreppumiðstøðum, viðgerðartilboðum ella privatum tilboðum, sum útinna uppgávur fyri tað almenna, fevnd av rættinum til at boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá.

Ásetingin kann t.d. verða nýtt í støðum, har ið eitt barn undir 18 ár, sum býr í Danmark, men sum er statt í Føroyum, fortelur einum fakfólki í Føroyum um seg sjálvan ella systkini hjá

sær, sum eru stødd og búgva í Danmark, og sum hava verið fyri vanrøkt og/ella ágangi. Í hesari støðuni kann fakfólkið í Føroyum boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum.

Ásetingin hevur við sær, at heimild er til at boða einum donskum myndugleika frá ávísum átaluverdum viðurskiftum viðvíkjandi einum barni. Rætturin til at boða frá kemur sostatt framum tagnarskylduna hjá fakfólkinum, eins og fakfólkið fær sama rætt til at geva upplýsingar víðari eftir dátuverndarlógini til ein danskan myndugleika sum eftir ásetingini um fráboðanarskyldu í § 14.

Fakfólk fevnd av ásetingini kunnu sjálvi velja, um tey ynskja at vera navngivin ella ónavngivin, tá ið tey boða frá til ein danskan myndugleika. Summi fakfólk hava einki ímóti, at navn teirra verður upplýst í hesum sambandi, meðan onnur fakfólk halda seg aftur frá at boða frá, um navn teirra verður upplýst. Tí er tað ikki ein treyt, at fakfólk skulu upplýsa navn, tá ið boðað verður frá eftir hesi áseting til ein danskan myndugleika.

Endamálið við ásetingini er at tryggja, at viðkomandi myndugleikar í Danmark verða varugir við og fáa kunnleika um børn og ung sum mistrívast, soleiðis at røttu myndugleikarnir kunnu meta um, um tørvur er á at seta í verk fyriskipanir.

Sambært § 59 í dátuverndarlógini krevur flutningur av persónsupplýsingum til útlond ikki serliga góðkenning ella loyvi frammanundan. Flutningurin av persónsupplýsingum skal tó vera í samsvari við dátuverndarlógina, og verður framdur eftir einari ítøkiligari meting í hvørjum einstøkum máli.

Nýggja ásetingin í § 14, stk. 7 verður sett inn í barnaverndarlógina sambært avtalu við danska Social-, Bolig- og Ældreministeriet, sum hevur sett somu áseting/heimild inn í nýggju donsku ‘barnets lov’.

Til § 1, nr. 2
Í § 19, stk. 5 verður heimild sett inn til at seta í verk fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Ikki einhvør tørvur kann hava við sær hjálp og stuðul sambært hesi grein. Fyriskipanirnar skula viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum hava verið orsøk til, at barnið varð sett heiman, og hjálpa foreldrunum at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman.

Óansæð um møguleiki er fyri, at foreldrini sum frá líður kunnu hava umsorgan aftur fyri barninum ella ikki, so hava foreldrini oftast ein týðandi leiklut í lívinum hjá barninum. Fyriskipanir kunna tí eisini setast í verk í mun til at hjálpa og stuðla foreldrunum í at hava samveru við barnið, og á henda hátt viðvirka til eina jaliga menning hjá barninum.

Stuðulin kann t.d. fevna um sálarfrøðiligar viðtalur, familjuviðgerð, skeið í foreldraførleika ella líknandi.

Ásetingin kann ikki verða nýtt í mun til at seta inn eftirlit ella stuðul í sambandi við samveru sambært § 22, stk. 4. Hetta tekur Føroya Kærustovnur avgerð um, eftir tilmæli frá barnaverndartænastuni.

Sambært § 27, stk. 7 í barnaverndarlógini er møguligt at seta fyriskipanir sambært § 15 í verk fyri barnið og fosturforeldrini, ímeðan barnið er til fosturs. Hetta merkir, at tað t.d. er møguligt at seta stuðul í heimið, geva fosturforeldrum sálarfrøðiliga hjálp, veita familjuviðgerð o.s.fr. Mett verður, at barnið á henda hátt fær tað best møguliga tilboðið frá skipanini.

Við hesum lógaruppskoti verður sama heimild sett inn í § 19, stk. 5, soleiðis at møguligt verður at seta í verk fyriskipanir fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Talan er einans um eina nágreining av galdandi siðvenju og viðmerkingum til barnaverndarlógina.

Í viðmerkingunum til § 15, stk. 1, nr. 2 stendur í mun til at veita familjuviðgerð ella líknandi stuðul, at barnaverndarnevndin kann veita familjuni viðgerð, tá ið barnið er sett heiman, um tað verður mett at hava týdning fyri barnið, t.d. um familjan við familjuviðgerð kann betra um sínar liviumstøður soleiðis, at barnið kann koma heim aftur at búgva.

Í viðmerkingunum til § 15, stk. 1, nr. 3 stendur í mun til at veita stuðul í heimið, at ímeðan barnið er sett heiman, kann vera neyðugt at veita familjuni stuðul, soleiðis at samanhangur er í viðgerðini, og barnið hevur betri møguleika fyri at virka, tá ið tað kemur aftur til foreldrini.

Harumframt stendur í viðmerkingunum til § 47 í barnaverndarlógini, at ein sjálvstøðug ætlan skal gerast fyri foreldrini, ímeðan barnið er sett heiman, og at fyriskipan skal setast í verk í mun til tann tørv, ið kanningin sambært § 45 hevur lýst. Víðari stendur, at tá ið eitt barn verður set heiman, er útgangsstøðið, at barnið skal heim aftur. Tískil er umráðandi at arbeiða við familjuni í mun til hetta. Júst hvør fyriskipan eigur at verða sett í verk, má metast um við støði í kanningini eftir § 45. Harumframt stendur, at tað sum eyðkennir fyriskipanirnar er, at tær antin eru ætlaðar at loysa trupulleikar hjá foreldrunum, ella ætlaðar at fyrireika familjuna til, at barnið kemur heim aftur. Er orsøkin til at barnið er sett heiman trupulleikar hjá foreldrunum, t.d. vansorgan, eigur ein fyriskipan at setast í verk til at loysa henda trupulleika.

Grundað á nevndu viðmerkingar er longu greið heimild til at seta fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Tørvur er tó á einari nágreining av hesum viðmerkingum í einari nýggjari áseting í § 19, stk. 5, sum gevur barnaverndarnevndini heimild til at veita hjálp og stuðul til foreldramyndugleikan eftir tørvi, ímeðan barnið er sett heiman, óansæð um barnið er sett heiman við ella uttan samtykki frá foreldramyndugleikanum. Hesin stuðulin skal viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum eru orsøk til umsorganaryvirtøkuna, og á henda hátt hjálpa foreldrunum at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan barnið er sett heiman.

Tað er altíð ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum máli, um fyriskipan er neyðug, og hvør fyriskipan skal setast í verk fyri at loysa trupulleikarnar hjá foreldrunum.

Fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 kunnu einans setast í verk við samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. Orsøkin til hetta er, at tað ikki kemur nakað burturúr at seta fyriskipanir í verk fyri foreldrini ímóti teirra vilja. Hetta má vera teirra egna val.

Víst verður til lógarviðmerkingarnar til § 15, stk. 1 í barnaverndarlógini.

Til § 1, nr. 3
Í § 21, stk. 3 verður nýggj áseting sett inn fyri at tryggja, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum er neyðug í mun til endamálið við heimansetanini, og sum er til barnsins besta.

Tað kann hava stóran týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at atgongd er hjá barnaverndarnevndini til at taka neyðugar avgerðir um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum.

Í ávísum førum ynskir foreldramyndugleikin ikki at samstarva við barnaverndartænastuna. Foreldramyndugleikin kann eisini vera ímóti ella ikki samdur við barnaverndartænastuni um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum. Støðan kann eisini verða tann, at foreldramyndugleikin ikki er førur fyri at taka eina væl grundaða avgerð um ítøkiligu støðuna hjá barninum vegna sálarligar avbjóðingar, menningartarn, misbrúk o.s.fr. Harumframt kann hugsast, at foreldramyndugleikin í ávísum førum ikki er tætt knýttur at barninum av ymiskum orsøkum, ella ikki hevur gott innlit í lívið ella gerandisdagin hjá barninum, og tí ikki kann gera eina væl grundaða meting av ítøkiligu støðuni hjá barninum. Tí er tað týdningarmikið, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti í lívinum hjá barninum, sum er til barnsins besta. Eftir galdandi lóggávu er ikki heimild hjá barnaverndarnevndini at taka avgerð um sera persónlig viðurskifti hjá barninum, um foreldramyndugleikin er ímóti avgerðini og ikki vil geva samtykki, heldur ikki sjálvt um barnið ynskir avgerðina.

Nýggja ásetingin í § 21, stk. 3 kann verða nýtt í sambandi við mál, ið snúgva seg um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum hava ovurstóran og víðfevndan týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan, og sum foreldramyndugleikin er ósamdur við barnaverndartænastuni um. Í hesum førum skal barnaverndarnevndin taka eina grundgivna fyrisitingarliga avgerð, ið kann kærast til Føroya Kærustovn. Eisini serliga víðfevndar samtyktir, sum ósemja er um, skulu verða fyrisitingarligar avgerðir, ið kunnu kærast til Føroya Kærustovn. Tá ið barnaverndarnevndin tekur slíka avgerð, skal stórur dentur verða lagdur á atlit til barnið og endamálið við heimansetanini.

Barnaverndarnevndin ger eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri, um neyðugt er at taka eina fyrisitingarliga avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum, grundað á um málið hevur ovurstóran týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan.

Fyrisitingarliga avgerðin hjá barnaverndarnevndini kann kærast til Føroya Kærustovn. Barnaverndarnevndin skal taka eina fyrisitingarliga avgerð um týðandi viðurskifti hjá barninum, óansæð um barnaverndarnevndin í fyrstu atløgu metir, at talan er um veruligt fyrisitingarvirksemi (faktisk forvaltningsvirksomhed). Føroya Kærustovnur roynir/avger síðani, um talan er um eina fyrisitingarliga avgerð ella veruligt fyrisitingarvirksemi. Er talan um veruligt fyrisitingarvirksemi, kann Føroya Kærustovnur ikki viðgera málið, sum verður avvíst. Klagur um veruligt fyrisitingarvirksemi kunnu sendast til viðkomandi kommunu.

Ásetingin ávirkar ikki galdandi fatan av, nær talan er um eina fyrisitingarliga avgerð, og nær talan er um veruligt fyrisitingarvirksemi. Ásetingin ávirkar heldur ikki galdandi mannagongd ella rættarstøðu í mun til, hvørji mál Føroya Kærustovnur kann viðgera/royna.

Harumframt broytir ásetingin ikki, at foreldramyndugleikin so vítt møguligt skal hava ávirkan á viðurskifti í gerandisdegnum hjá barninum, sum til dømis í mun til val av klæðum,

skúlatilboði og frítíðarítrivi, tá ið tað gevur meining í mun til at stuðla uppundir, at foreldramyndugleikin hevur ein týðandi leiklut í lívinum hjá barninum.

Hvørjar avgerðir barnaverndarnevndin kann taka um persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga valdast um, hvat er neyðugt í mun til endamálið við heimansetanini, herundir í mun til menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum. Avgerðin skal viðvíkja viðurskiftum, sum eftir umstøðunum er neyðugt at taka avgerð um, og sum hava ovurstóran og víðfevndan týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan. Barnaverndarnevndin skal altíð taka stórt atlit at ynskjunum hjá barninum, um barnsins aldur og búning loyvir tí.

Talan kann t.d. verða um mál, ið snúgva seg um evni av stórum týdningi fyri barnið ella foreldramyndugleikan. Skal barnið ella tann ungi hava týðandi og avgerandi læknaviðgerð ella læknainntriv, sum foreldramyndugleikin er ósamdur í, krevur hetta, at barnaverndarnevndin tekur eina grundgivna fyrisitingarliga avgerð um hesi viðurskifti eftir § 21, stk. 3. Barnaverndarnevndin kann t.d. taka avgerð um at seta í verk eina læknaliga kanning og/ella viðgerð av barninum, sum krevur innlegging á sjúkrahúsi, bæði á somatiskari og psykiatriskari deild. Avgerð kann eisini verða tikin um, at eitt barn undir 15 ár skal koppsetast ella útgreinast, sum kann hava stóran týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan. Metir barnaverndarnevndin, at viðgerðin er neyðug grundað á týðandi atlit til heilsu, menning og ynskini hjá barninum, kann avgerð verða tikin um hetta, sjálvt um foreldramyndugleikin er ósamdur í avgerðini. Tað er ikki nóg mikið at vísa til yvirskipað samfelagsáhugamál, almenn tilmælir ella at avgerðin yvirskipað er til gagns fyri barnið. Avgerðin skal vera grundað á ítøkiligu støðuna og viðurskiftini hjá einstaka barninum, og dentur skal verða lagdur á ynskini hjá barninum. Hetta sama ger seg galdandi í mun til barnakoppsetingar.

Eisini kunnu spurningar um átrúnaligar ella aðrar lívsáskoðanir verða dømir um sera persónlig viðurskifti hjá barninum, sum hava ovurstóran týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan, herundir t.d. um dóp ella konfirmatión. Barnaverndarnevndin kann eisini taka avgerð eftir § 21, stk. 3, um barnið skal skifta skúlatilboð, og hetta hevur stóran týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan, sum er ósamdur.

Ásetingin í § 21, stk. 3 er ikki úttømandi. Hetta merkir, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð um onnur persónlig viðurskifti hjá barninum enn tey, ið eru nevnd í ásetingini og viðmerkingunum.

Barnaverndarnevndin skal ikki taka avgerð eftir ásetingini í § 21, stk. 3, tá ið talan eyðsæð er um veruligt fyrisitingarvirksemi (faktisk forvaltningsvirksomhed), sum t.d. val av kommunulækna, skúla, keyp av klæðum, frítíðarítriv og líknandi. Praktiskir spurningar og planlegging av gerandisdegnum hjá barninum er eisini veruligt fyrisitingarvirksemi, sum t.d. hvat klokkan barnið skal í skúla, ella hvat barnið kann eta. At fara til kommunulækna ella sálarfrøðing við barninum og t.d. fyriskipaður heiligvágur er eisini aloftast veruligt fyrisitingarvirksemi. Barnaverndarumsitingin kann taka støðu til hesi viðurskifti í samstarvi við stovnin ella fosturforeldrini. Tó eigur at verða hugsað um, hvørji av hesum viðurskiftum foreldramyndugleikin við fyrimuni kann fáa ávirkan á, soleiðis at viðkomandi framvegis hevur ávirkan á lívið hjá barninum, og kennir seg sum foreldur at barninum.

Í summum førum kann ivi verða um, nær talan er um tílík persónlig viðurskifti hjá barninum, sum barnaverndarnevndin skal taka eina fyrisitingarliga avgerð um, og nær talan er um veruligt fyrisitingarvirksemi, ið avgerð ikki skal takast um. Tað avgerandi er, at talan er um

persónlig viðurskifti hjá barninum, sum hava ovurstóran og víðfevndan týdning fyri barnið og/ella foreldramyndugleikan, og sum foreldramyndugleikin er ósamdur við barnaverndartænastuni um. Í tílíkum førum skal barnaverndarnevndin taka eina grundgivna fyrisitingarliga avgerð, ið kann kærast til Føroya Kærustovn.

Barnaverndarstovnurin og/ella fosturforeldrini hava møguleika at virka innanfyri karmarnar av avgerðini hjá barnaverndarnevndini eftir § 21, stk. 3, men kunnu ikki sjálvi taka avgerð um, at barnið t.d. skal skifta skúlatilboð ella hava víðfevnda viðgerð, ið einans barnaverndarnevndin kann taka avgerð um sambært § 21, stk. 3.

Til § 1, nr. 4
Í § 42, stk. 2, nr. 4 verður konsekvensrættað, soleiðis at ásetingin endar við einum punktum. Sí viðmerkingina til broytingina í nr. 5.

Til § 1, nr. 5
Í sambandi við at Almannamálaráðið í 2021 framdi eftirlit við útvaldum barnaverndartænastum kring landið varð staðfest, at ásetingin í § 42, stk. 2, nr. 5 var óneyðug í sambandi við at skriva eina gerðabók um fundirnar hjá barnaverndarnevndini. Ásetingin verður tískil strikað.

Til § 1, nr. 6
Sambært barnaverndarlógini verður barnaverndarøkið umsitið av staðbundnum kommunalum barnaverndartænastum. Barnaverndarmál verða umsitin alt eftir, hvar tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, búgva. Heimild er ikki í galdandi barnaverndarlóg hjá nøkrum myndugleika at taka avgerð um at flyta eitt barnaverndarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Eitt barnaverndarmál verður tó sjálvvirkandi flutt, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, flyta bústað til eitt annað barnaverndarøki, sbrt. § 58 í barnaverndarlógini.

Í heilt serligum førum kann tørvur verða á at flyta eitt barnaverdarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Hetta kann t.d. verða vegna eina sera fastlæsta støðu hjá ávísum foreldrum í einum ítøkiligum barnaverndarmáli. Tørvur kann í hesum førum verða á, at ein onnur barnaverndarnevnd yvirtekur málið at viðgera og meta um. Í summum førum kann hetta gera mun fyri samstarvið og samskiftið millum foreldrini og barnaverndartænastuna um málið, og verða til gagns fyri bæði barnið og familjuna. Hetta verður tó einans møguligt í heilt serligum førum, tá ið barnaverndarnevndin metir, at hetta er alneyðugt fyri samstarvið og samskiftið í málinum, og fyri barnið og foreldrini.

Er talan um fleiri systkin við somu foreldrum, ið hava hvør sítt barnaverndarmál í einari barnaverndartænastu, kunna øll málini ella bert eitt av málunum verða flutt til eina aðra barnaverndartænastu at umsita. Hetta metir avvarðandi barnaverndarnevnd um.

Heilt serligar umstøður eru t.d. tá eitt barnaverndarmál hevur koyrt í fleiri ár hjá somu barnaverndartænastu, har ið samskiftið og samstarvið millum foreldrini og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu.

Avvarðandi barnaverndarnevnd setur seg í sambandi við eina aðra barnaverndarnevnd, ið er egnað og villig til at viðgera og meta um málið. Barnaverndarnevndirnar gera eina skrivliga avtalu um, at nýggja barnaverndarnevndin yvirtekur ábyrgdina av málinum, og fer at umsita

málið varandi. Nýggja barnaverndarnevndin viðger málið á sama hátt, sum tá ið foreldramyndugleikin flytur bústað til eitt annað barnaverndarøki sambært § 58, stk. 1. Hetta merkir, at nýggja barnaverndarnevndin metir ikki um málið av nýggjum, men heldur áfram har fyrrverandi barnaverndartænasta slepti. Nýggja barnaverndarnevndin kann tó velja at viðgera málið av nýggjum og/ella gera nýggjar metingar, og seta nýggjar ella aðrar fyriskipanir í verk fyri barnið og familjuna. Tann barnaverndarnevndin, ið hevur ábyrgdina av málinum, rindar útreiðslurnar, ið standast av málinum.

Avvarðandi barnaverndarnevnd metir sjálv um, um tað er neyðugt og ráðiligt at flyta eitt barnaverndarmál til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Barnaverndarnevndin tekur støðu til henda spurning eftir umbøn frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, skal samtykki til at málið verður flutt fáast frá báðum. Metir avvarðandi barnaverndarnevnd ikki, at tað av ymiskum orsøkum (t.d. atlit til barnið) er neyðugt og ráðiligt at flyta eitt mál til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita, er henda metingin endalig, og kann ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika at taka støðu til. Grundin til hetta er, at avvarðandi barnavernarnevnd kennir málið best, og hevur nágreiniligt innlit í allar síður og støður í málinum, fyriskipanir og viðurskifti hjá barninum og familjuni. Avvarðandi barnaverndartænasta er tí best skikkað til at meta um, um tað er neyðugt og ráðiligt fyri barnið og familjuna at flyta málið til eina aðra barnavernarnevnd at umsita.

Endamálið við nýggju ásetingini í § 58, stk. 4 er at hjálpa einum barni og familju í heilt serligum førum, tá ið málið og støðan tykist so fastlæst og vónleys, eins og samskiftið og samstarvið millum foreldur og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu.

Til § 1, nr. 7
Í § 65, stk. 1 verður konsekvensrættað, soleiðis at ásetingin at enda vísir til nýggju ásetingina í § 65, stk. 3. Sí viðmerkingina til broytingina í nr. 8.

Til § 1, nr. 8
Í § 65, stk. 3 verður nýggj áseting sett inn um, at avgerðir sambært § 58, stk. 4 - um at flyta eitt barnaverndarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita - ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Eftir § 58, stk. 4 kann eitt barnaverndarmál í heilt serligum førum verða flutt til eina aðra barnaverndartænastu at umsita, t.d. vegna eina sera fastlæsta støðu hjá ávísum foreldrum í einum ítøkiligum barnaverndarmáli. Tørvur kann tá verða á, at ein onnur barnaverndarnevnd yvirtekur málið at viðgera og meta um. Hetta verður tó einans møguligt í heilt serligum førum, tá ið barnaverndarnevndin metir, at hetta er alneyðugt fyri samstarvið og samskiftið í málinum, og fyri barnið og foreldrini. Sí nærri um § 58, stk. 4 í viðmerkingunum til hesa ásetingina.

Avvarðandi barnaverndarnevnd metir sjálv um, um tað er neyðugt og ráðiligt at flyta eitt barnaverndarmál til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Barnaverndarnevndin tekur støðu til henda spurningin eftir umbøn frá foreldramyndugleikanum. Metir avvarðandi barnaverndarnevnd ikki, at tað av ymiskum orsøkum (t.d. atlit til barnið) er neyðugt og ráðiligt at flyta eitt mál til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita, er henda avgerðin endalig, og kann ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika at taka støðu til.

Grundin til, at avgerðin hjá avvarðandi barnaverndarnevnd ikki kann kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, er, at tað er avvarðandi barnavernarnevnd, sum kennir málið best, og hevur nágreiniligt innlit í allar síður og støður í málinum, herundir allar fyriskipanir, ið eru settar í verk og øll viðurskifti hjá barninum, foreldrunum og familjuni annars. Avvarðandi barnaverndartænasta er tí uttan iva best skikkað til at meta um, um tað er neyðugt og ráðiligt fyri barnið og familjuna at flyta málið til eina aðra barnavernarnevnd at umsita. Mett verður ikki, at aðrir fyrisitingarligir myndugleikar kunnu gera somu meting við fyriliti til øll sjónarmið í málinum, av tí at teir ikki hava sama nágreina innlit í málið, á sama hátt sum avvarðandi barnaverndarnevndin hevur, og kunnu tískil ikki gera eina grundaða meting av, hvat er best fyri barnið, foreldrini og aðrar partar í málum.

Til § 2
Gildiskoma.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 7. mars 2024

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummælisskriv frá Føroya Kærustovni
Fylgiskjal 3: Ummælisskriv frá Familjufyrisitingini
Fylgiskjal 4: Ummælisskriv frá Sernám
Fylgiskjal 5: Ummælisskriv frá Heilsurøktarafelagnum
Fylgiskjal 6: Ummælisskriv frá Almanna- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 7: Ummælisskriv frá Sosialráðgevarafelag Føroya
Fylgiskjal 8: Ummælisskriv frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 9: Ummælisskriv frá Barnaverndartænastuni í Tórshavn
Fylgiskjal 10: Ummælisskriv frá Familjuhjálpini
Fylgiskjal 11: Ummælisskriv frá Føroya Politi
Fylgiskjal 12: Ummælisskriv frá MEGD
Fylgiskjal 13: Ummælisskriv frá Barnaverndarstovu Føroya